# SAVNSFAGNAÐUR 2010

Teknikappingin fyri ung í aldrinum 12-20 ár **“Eygleið, tekna og gev víðari”**

## Send inn eina eygleiðing í livandi myndum og vinn eitt filmstól!

Tak tína telefon, myndatólið hjá pápa ella videotólið hjá mammu og hygg! Filma tað, tú sært! Her snýr tað seg ikki um at gera filmslistarligar perlur við “effektum” av øllum handa slagi. Nei . . . bert at hyggja, vera árvakin og skráseta eygleiðingina. Hygg at tínum gerandisdegi. Lat eyguni upp, ver forvitin. Heimurin er fullur av stuttligum lutum og merkisverdum tilburðum og fyribrigdum. Eygleið tey, filma tey og gev tey víðari. Títt fyrsta stig móti list og vísindi er gjørt!

Náttúran er allastaðni kring teg . . . og tú ert ein partur av henni. Eygleið hana, varnast hana, filma hana. Ein stuttligur fuglur, eitt illveður, ein dagur á seiðabergi, grasið á gøtuni, tú gongur á í skúla... Einki er, sum ikki hevur áhuga. Her valdast bara um eyguni, sum síggja.

Eygleið ommu tína og síggj teg sjálvan gjøgnum hana. Eygleið minnisvarðan og søgubrot, ið eru tengd at honum. Varnast eitt gamalt hús. Hetta er tín søga og ein partur av tínum samleika – og søgan er allastaðni kring teg.

List er at taka veruleikan og viðgera hann gjøgnum sínar egnu “brillur”. Eygleið listina, varnast málningarnar og standmyndirnar, lurta eftir tónleikinum, síggj dansin og filma veruleikan, sum eisini er í tulkingini.

### Praktiskar upplýsingar:

- Hvør luttakari kann senda ein ella fleiri filmar inn.
- Filmarnir kunnu gjarna vera minni enn ein minutt til longdar - í mesta lagi tveir minuttir.
- Filmarnir skulu sendast til Savnsfagnaðin, snar@snar.fo áðrenn 30. september 2010. Skriva navn, bústað, telefonnummar og aldur í teldupostin.
- Best er, at filmurin hevur eitt vanligt windowsformat sum t.d. .wmv, .mov, .mpg, .mp4, .avi.
- Les meira um kappingina og Savnsfagnaðin á www.snar.fo/savnsfagnadur.
- Spurningar kunnu sendast samskiparanum á rakel.helmsdal@gmail.com.
- Eitt ávíst tal av filmum verður valt út til atkvøðugreiðslu. Savnsfagnaðurin tilskilar sær rætt at nýta filmarnar í sambandi við tiltøkini og í undirvsísingarhøpi.
- Atkvøðugreiðslan fer fram á søvnunum í heystfrítíðini. Tit kunnu øll vera við til at gera av, hvør vinnarin verður.
- Vinnarin verður kunngjørdur á tiltaki á Savnsfagnaðinum fríggjadagin tann 15. oktober 2010.
- Høvuðsvinningurin er eitt filmsupptøkutól frá Elding, men smærri vinningar verða eisini til útvaldu filmarnar.

Tórshavn 25. august 2010

**Samskipari**
**Rakel Helmsdal**

---

Savnsfagnaðurin 2010 verður fyriskipaður av hesum stovnum:
Náttúrugripasavnið, Jarðfeingi, Sjósavnið, Listasavnið, Fornminnissavnið, Skúlabókagrunnurin og Landsmiðstøðin